# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Karen Jespersen er eitt upplagt evni sum ráðharri í einari borgarligari stjórn*

*Claus Hjort Frederiksen, ráðharri*




# Neyðtøkur gerandiskostur í Liberia

**Borgarakríggið í Liberia er av, men harðskapurin stendur við, og tað eru sum altíð tey veikastu, sum líða**

Fyri einum ári síðani varð Ellen Johnson-Sirleaf vald til forseta í Liberia, og hon lovaði tá at fara í hernað ímóti tí ógvusliga harðskapinum, sum kom í kjalarvørrinum av tí 14 ára langa borgarakrígnum, sum júst var endað.

Men nú eitt ár er farið, bendir nógv á, at hetta er eitt stríð, sum hon neyvan fer at vinna. Eitt dømi um tað var tann 11 ára gamla Janjay Gargar, sum doyði fyri nøkrum døgum síðani eftir eina ógvusliga neyðtøku. Men kanska kann júst deyði hennara fáa týdning, tí í dag er hon ímyndin av stríðnum ímóti áganginum.

Annie Demen, sum er ráðharri í javnstøðumálum í Liberia, sigur við BBC, at myndugleikarnir noyðast at verja kvinnurnar og børnini. Men tann uppgávan er ovurstór. Børn og kvinnur, sum vóru við barn, hava latið lív orsakað av ógvuligum neyðtøkum, og í kirkjugarðinum í høvuðsstaðnum Monrovia er stutt ímillum gravirnar hjá teimum, sum hava verið offur fyri neyðtøkumonnum.

Undir borgarakrígnum vórðu neyðtøkur brúktar sum eitt amboð fyri at ræða kvinnur og at noyða tær at hjálpa herinum. Sambært eygleiðarum er støðan lítið mætari í dag, hóast borgarakríggið er av. Í dag eru tað ikki bara kvinnur, sum verða neyðtiknar, men eisini børn, sigur BBC.

**Eisini smábørn**

Felagsskapurin Læknar uttan Landamark sigur í einari frágreiðing, at í Monrovia verða altsamt fleiri kvinnur og børn neyðtikin, og at harðskapurin er í ferð við at breiða seg út um landið.

Læknarnir vísa á tað harmiliga í, at í fleiri afrikonskum londum er tað vanlig uppfatan, at menn, sum hava AIDS, verða lektir, um teir hava kynsligt samband við smábørn, og at hetta er vorðið ein stórur trupulleiki í Liberia og aðrastaðni.

# CIA-agentar skulu handtakast

***Ákæruvaldið í Týsklandi krevur, at 13 agentar hjá amerikonsku fregnartænastuni skulu takast, tí teir burturfluttu ein týskan ríkisborgara.***

Fyri skjótt fýra árum síðani burturfluttu amerikanskir agentar týska ríkisborgaran Khaled el Masri á markinum millum Serbia og Makedonia. Agentarnir, sum arbeiddu hjá fregnartænastuni CIA, fóru til Afghanistan við Masri. Amerikanararnir vildu vera við, at hann var yvirgangsmaður, og í fimm mánaðir sat Masri í einari fangalegu, har hann javnan bleiv avhoyrdur og illa viðfarin.

Tá Khaled el Masri loksins slapp aftur til Týsklands, vakti málið stóran ans, og mong undraðust á, at táverandi týska stjórnin ikki hevði gjørt meiri fyri at fáa hann úr amerikonsku fangaleguni. Onkur vildi vera við, at týskir agentar høvdu hjálp teimum amerikonsku.

Ákæruvaldið hevur kannað málið leingi, og í gjár bleiv kunngjørt, at 13 agentar hjá CIA eru eftirlýstir um allan heimin. Týska ákæruvaldið væntar kortini ikki, at USA fer at útflýggja teir, men hinvegfin er greitt, at seta teir fótin á týska jørð, verða teir tiknir og drignir fyri rættin, skrivar DPA.

## STUTT SAGT

### Eigur at fáa Nobel

Fyrrverandi amerikanski varaforsetin Al Gore eigur at fáa friðarheiðursløn Nobels. Tað halda í hvussu er norsku politikararnir Børge Brende og Heidi Sørensen. Tey vísa á, at Al Gore hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri at sannføra heimsins leiðarar um, at tað er alneyðugt at taka stig, sum kunnu tálma veðurlagsbroytingunum. Somuleiðis hevur hann víst á, at avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum kunnu hótta heimsfriðin. Børge Brende og Heidi Sørensen halda, at kanadiska Sheila Watt-Cloutier eigur at fáa heiðurslønina saman við Al Gore. Hon er inuittur og hevur seinastu árini víst á tær ovurstóru avleiðingarnar, sum veðurlagsbroytingarnar kunnu fáa í tí arktiska økinum.

### Kann blíva ráðharri

Í gjár varð staðfest, at fyrrverandi danski innanríkisráðharrin Karen Jespersen skal stilla upp fyri Vinstra til næsta fólkatingsval. Karen Jespersen var sosialdemokratiskur fólkatingslimur í mong ár, men fór burtur úr flokkinum, tí hon var misnøgd við politikk floksins. Leiðarar í Vinstra siga nú, at tað er væl hugsandi, at Karen Jespersen verður ráðhari aftur, men nú fyri Vinstra.

### Konan í øðini

Fyrrverandi italski forsætisráðharrin Silvio Berlusconi er ikki kendur fyri at vanda sær um orðini, og hann fór eftir øllum at døma ov langt, tá hann nú um dagarnar segði, at hann var til reiðar at pakka kuffertið beinanvegin, um hann kundi sleppa at ferðast saman við einari venesuelskari vakurleikadrotning, sum hann hevði sæð í sjónvarpinum. Í gjár svaraði frú Berlussoni aftur. Í einum lesarabrævi í blaðnum La Republica skrivaði h on, at orðini hjá manninum vóru niðrandi fyri seg, og hon kravdi at fáa eina almenna umbering frá manninum.